# Dýrari olja - dýrari rávøra

**- Rávøra er sum heild vorðin dýrari, síðan oljuprísirnir byrjaðu at hækka. Hetta er ikki bara galdandi fyri fiskaprísir, sigur formaðurin í Ráfiskakeyparafelagnum**

Vilmund Jacobsen

Símun Jacobsen, formaður í Ráfiskakeyparafelagnum, væntar, at góði upsaprísurin, sum verið hevur í seinastuni, fer at halda sær eina tíð enn, men síðan fer prísurin helst at leggja seg á eina lægri legu.

Hann vísir á, at góði upsaprísurin, sum verið hevur í seinastuni, partvís kemst av, at tørvur hevur verið á upsa í Týsklandi og Fraklandi, har teimum dámar væl hetta fiskaslag.

- Føroyski upsafiskiskapurin var vánaligur í seinnu hálvu av 2010, men er nú vorðin betri aftur. Upsaprísurin hevur verið góður, og eg vænti, at hann verður góður í eina tíð enn, kanska í einar 2-3 mánaðir. Síðan fer prísurin helst at fella nakað aftur, men eg trúgvi ikki, at upsaprísurin gerst lágur aftur.

Tað segði Símun Jacobsen við útvarpið hjá Kringvarpinum fríggjadagin.

Hann legði aftrat, at upsaprísurin, tá hann fellir aftur, helst fer at liggja um einar 7,50-8 krónur fyri kilo, og tað verður framvegis mett at vera rímiliga góður prísur.

Formaðurin í Ráfiskakeyparafelagnum segði, at allar rávørur eru dýrkaðar, og hetta kemst ikki minst av høga oljuprísinum, vit hava í løtuni.

- Hetta er ikki bara galdandi fyri fiskaprísir, men fyri flest allar rávørur, legði hann aftrat.

Símun Jacobsen segði seg onga løtu ivast í, at góða veiðan seinastu tíðina og góði upsaprísurin fara at síggjast aftur hjá ísfiskatrolarunum, sum annars hava havt tað truplt.

vilmund@sosialurin.fo



*- Góði upsaprísurin fer at síggjast aftur hjá ísfiskatrolarunum, sum annars hava havt tað truplt, sigur formaðurin í Ráfiskakeyparafelagnum*




## *Rendu inn í tunnilvegg*

**Hví varð Norðskálatunnilin stongdur í ein góðan tíma seinasta fríggjakvøld?**
- Hetta var í samband við, at eitt ferðsluóhapp hendi í tunlinum hetta kvøldið, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Havn.

**Hvat hendi?**
- Tað var ein bilur, sum kom inn í tunnilin eystanfyri og rendi inn í tunnilsveggin. Tvey fólk vóru í bilinum. Tey vórðu flutt á Landssjúkrahúsið til kanningar, og fólk hjá Brandstøðini í Havn komu eftir bilinum.

**Fingu tey ferðandi nakað mein?**
- Vit skiltu, at talan var ikki um álvarsligt mein, men hjálparfólkini tóku kortini tey fyrivarni, sum neyðug eru at taka í slíkum føri.

**Hvussu tá?**
- Tey ferðandi, sum vórðu flutt á Landssjúkrahúsið, fingu nakkastúttu um nakkan, áðrenn flutningurin byrjaði. Hetta er nakað, sum altíð verður gjørt, tá bilur soleiðis rennur inn í ein tunnilsvegg, sigur vakthavandi.

## Í MORGIN




6-11 m/s | 10-15 m/s

Stívt andøvsgul upp í hvassan vindi av vestri, seinnapartin nakað minni vindur av útsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 3 og 6 stig

## MIKUDAGIN




5-10 m/s | 13-18 m/s

Strúkur í vindi elle hvassur vindur av vestri og regn, seinnapartin minni vindur av útnyrðingi og okkurt ælið. Um kvøldið lot av útnyrðingi og yvirhøvur turt. Hitin millum 5 og 8 stig.

## HÓSDAGIN




1-6 m/s | 1-6 m/s

Lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin milum 1 og 5 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 984 hPa. norðanfyri Føroyar fer í landnyrðing eystan




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið norðanfyri Ísland fer eystureftir og brúgvalagið við Føroyar fer í landsynning.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 132 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | -9 | Tromsø | -1 | Moskva | -13 | Athen | 14 |
| Reykjavík | 8 | Bergen | -2 | Berlin | -6 | Beijing | 11 |
| Tórshavn | 7 | Oslo | -9 | Paris | 3 | New Dehli | 20 |
| Lerwick | 4 | Stokkhólm | -6 | Madrid | 15 | Bangkok | 32 |
| Aberdeen | 7 | Keypmannah. | -4 | Róm | 11 | Sydney | -- |
| London | 8 | Helsinki | -19 | Malorca | 15 | New York | 2 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

19. mars Fullmáni/Mánin næstur jørðini
26. mars Seinna kvarter
2. apríl Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. mars | 07:33 | 20:00 | 06:33 | 19:00 | 06:48 | 19:15 | 09:33 | 22:00 | 10:33 | 23:00 | 05:48 | 18:15 | 04:48 | 17:15 | 07:48 | 20:15 | 08:48 | 21:15 | 07:18 | 19:45 | 08:33 | 21:00 |
| 22. mars | 08:27 | 20:55 | 07:27 | 19:55 | 07:42 | 20:10 | 10:27 | 22:55 | 11:27 | 23:55 | 06:42 | 19:10 | 05:42 | 18:10 | 08:42 | 21:10 | 09:42 | 22:10 | 08:12 | 20:40 | 09:27 | 21:55 |
| 23. mars | 09:24 | 21:52 | 08:24 | 20:52 | 08:39 | 21:07 | 11:24 | 23:52 | - | 12:24 | 07:39 | 20:07 | 06:39 | 19:07 | 09:39 | 22:07 | 10:39 | 23:07 | 09:09 | 21:37 | 10:24 | 22:52 |
| 24. mars | 10:20 | 22:48 | 09:20 | 21:48 | 09:35 | 22:03 | - | 12:20 | 00:52 | 13:20 | 08:35 | 21:03 | 07:35 | 20:03 | 10:35 | 23:03 | 11:35 | - | 10:05 | 22:33 | 11:20 | 23:48 |
| 25. mars | 11:16 | 23:57 | 10:16 | 22:57 | 10:31 | 23:12 | 00:48 | 13:16 | 01:48 | 14:16 | 09:31 | 22:12 | 08:31 | 21:12 | 11:31 | - | 00:03 | 12:31 | 11:01 | 23:42 | - | 12:16 |